# KIN HJÁ EINUM




*– Eg eri vanur við at hava ein stóran og sentralan leiklut á teimum liðum, eg spæli á. Tað havi eg als ikki her, og tað havi eg eisini trupult við at góðtaka, sigur Atli Gregersen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

donsku deildina, bestu føroysku deildina, landsdystirnar og so næstbestu skotsku deildini.

– Eg kann bara siga, at tað er so ófatiliga ymiskt. Venjingin her er á nógv hægri støði, enn eg havi sæð aðrastaðni, men tað sæst ikki aftur undir dysti. Hinvegin kann eg dekka Anelka uttan at vera hildin fyri skommum á nakran hátt, men venjarin metir meg kortini ikki vera nóg góðan til næstbestu skotsku deildina í løtuni. Hvussu tað hongur saman, skilji eg ikki. Mínir liðfelagar hava eisini sæð landsdystin móti Norður Írlandi, sum varð vístur á Sky. Teir søgdu við meg, at tað kláraði eg væl og spurdu so, hví eg ikki spældi meira við teimum. Eg dekkaði jú Lafferty, sum spælir við Rangers í bestu deildini. Tað gekk fínt og tað havi eg eisini gjørt venjaran varugan við, sum sigur, at mín tíð nokk skal koma, greiðir Atli Gregersen frá.

Gøtumaðurin hevur kortini ongan hug, at gera seg betri enn sínar liðfelagar.

– Hevði eg verið nógv betri enn allir mínir liðfelagar í Ross County, so hevði eg sjálvandi spælt, sigur hann.

– Men øgiliga ofta er tað ein spurningur um álit, og tað havi eg ikki frá venjaranum í løtuni.

Hóast vantandi álit og dystarvenjingin, so hevur Atli Gregersen á ongan hátt mist hugin til fótbólt.

– Eg havi tað best í Skotlandi, tá vit venja. Minst tveir tímar við bólti, tað er sum at vera smádrongur aftur. Og so veit eg eisini, at eg havi ment meg. Eg orki væl betri, dugi betri at avlevera og so framvegis. Uttanfyri vøllin læri eg eisini eina rúgvu um eina fremmanda mentan og øðrvísi mál. Eg læri eisini nakað um, hvat eg vil vera við til og hvat eg ikki vil vera við til. Og so havi eg eisini lært, at eg kanska ikki eri heilt so góður, sum eg helt, sigur Atli Gregersen úr Skotlandi.

*rolant@sosialurin.fo*